Jógvan við Keldu stak ónøgdur við strandferðslustjóran

SAMFERÐSLAN
Solby A. Eliasen

Klaksvík: Jógvan við Keldu, løgtingsmaður og formaður í Vinnulívsráðnum í Klaksvík er ógvuliga ónøgdur við handfaringina hjá strandferðslustjóranum Reidar Nónfjall av siglingini um Leirvíksfjørð. Jógvan í Keldu fer so langt í samrøðu við Sosialin, at hann undrast á at Reidar Nónfjall enn situr í starvinum. Hann sigur soleiðis:

- Nónfjall enn í starvinum – meðan vinnan í Norðoyggjunum er situr í saksinum. Skal hetta fáa avleiðingar? Tað er altíð torført, tí spurningurin er, um ein frægari stjóri fæst, heldur Jógvan við Keldu. Og hendir ikki nakað, so sigur Jógvan, at hann verður noyddur at fara á hægri stað við hesum, tí hetta málið kann loysast uttan at tær stóru upphæddirnar verða játtaðar. - Og hetta er ikki nakar vitskapur.

- Tað undrar meg, at Nónfjall í dag tosar um langtíðarætlanir, tí allir føroyingar vita, at um onki óvanligt hendir, so verður fast samband um Leirvíksfjørð um ikki so langa tíð. Og tá verður tað so ikki Strandferðslan, sum kemur í trupulleikar,

Hetta sigur Jógvan við Keldu, løgtingsmaður, sum eisini er formaður í Vinnulívsráðnum í Klaksvík. Í hesi greinini svarar hann Reidari Nónfjall, stjóra í Strandferðsluni aftur. Í Sosialinum hósdagin vóru greinar um samferðslustøðuna í millum Klaksvík og Leirvík. Tá tosaði stjórin í Strandferðsluni millum annað um, at tað skulu langtíðarætlanir til at loysa tílíkar truplar støður.

- Nú at tosa um langtíðarætlanir er ómetaliga eyðkent fyri ópraktiskar teoretikarar, og er tað nakað vit føroyingar eiga nóg mikið av, so eru tað álit, sum ikki verða nýtt til nakað uttan at liggja og savna dust, heldur Jógvan við Keldu.

- Nónfjalli nýtist ikki at hugsa um langtíðarætlanir viðvíkjandi Leirvíksfirðinum. Tað sum hann eigur og skal taka sær av, er frá viku 26 í 2002 og inntil fasta sambandið er veruleiki.

Arbeiðsbólkur settur

Jógvan sigur, at í 1998 møttust vinnulívsfólk og býráðið og tosaðu um álvarsligu støðuna í ferðsluni um Leirvíksfjørð - her vóru fólk, ið vinnuliga og hugsjónarliga dugdu at síggja fram í tíðina. Út frá hesum fundi varð avrátt at fáa sett ein bólk at arbeiða við málinum.

Hesin bólkur bleiv settur og í hann komu: Magnus Magnussen, Heri Joensen og Schumann Hansen fyri Strandferðsluna, Signar Heinesen fyri Landsverkfrøðingin, Jógvan Høj fyri vinnuna og Heri Hammer og Rani Nolsøe fyri Klaksvíkar Kommunu.

Jógvan við Keldu sigur, at hesin bólkurin hevði nakrar fáar fundir, hvar heilt greiðar linjur vórðu settar út í kortið.

- Og her varð millum annað talan um eina bíleggingarskipan, sum kundi gera viðurskiftini viðvíkjandi ferðasambandinum um Leirvíksfjørð einfaldari og har afturat gera ferðsluna meiri liðiliga, greiðir Jógvan frá, og hann heldur fram, at tað sum síðani hendi eftir fáum fundum var, at Strandferðslan ikki vildi spæla við meira og í síðsta lagi tók Strandferðslan síni umboð úr bólkinum.

- Eg rykti fleiri ferðir Strandferðsluna eftir hvør orsøkin var, og tað gjørdi Rani Nolsøe eisini, men eftir ein slutur fyri ein slatur, hoyrdist onki aftur, sigur Jógvan við Keldu.

Jógvan er vísur í, at um hesin arbeiðsbólkur hevði fingið arbeiðsfrið seinastu fýra árini, so hevði støðan als ikki verið so álvarslig, sum hon er í dag.

Jógvan heldur eisini, at Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni als ikki fatar, hvussu álvarslig støðan í veruleikanum er – eisini tann arrogansan sum Strandferðslan ofta vísir, ikki at vilja tosa við, sum vanliga nýta farleiðina og eru kundar.

Í viðmerking til tað sum Reidar Nónfjall segði í Sosialinum hósdagin, um at tað vóru mong sum vóru í móti at Dúgvan fór at sigla um Leirvíksfjørð, sigur Jógvan, at hatta bert er ein roynd at bjarga sær undan einum og hvørjum.

- Tað vóru tey allarflestu, sum vóru glað fyri at Dúgvan kom. Tað vilja altíð verða fólk, sum eru í móti, soleiðis eigur tað at vera í einum demokratiskum samfelagið, sigur Jógvan.

Reidar Nónfjall fullgreiður yvir truplu støðuna um Leirvíksfjørð

Stjórin á Strandferðsluni sigur, at ikki kann væntast, at ein undirsjóvartunnil verður klárur til nýtslu um Leirvíksfjørð innan fyri tey komandi fimm til átta árini.
- Í okkara verð er ein langtíðarætlan trý til fimm ár, og tí gevur tað meingin at tosa um langtíðaraætlanir í hesum sambandinum, sigur Strandferðslustjórin

SAMFERÐSLA
Solby A. Eliasen

Reidar Nónfjall sigur í viðmerking til tað sum Jógvan við Keldu førir fram, at hann veit fullvæl, hvussu trupul støðan er um Leirvíksfjørð. Hann sigur eisini, at hann hevur tosað við skiparan á Dúgvuni um støðuna.

- Tað eru fløskuhálsar um Leirvíksfjørð og tað er ikki nakað nýtt, men vit gera tað vit kunnu fyri at loysa trupulleikan, sigur Reidar og endurtekur tað, sum hann segði í greinini í Sosialinum hósdagin um at fáa polititkararnar at góðtaka at Ternan ella Sam kann verða sett inn í sigling aftur at Dúgvuni um Leirvíksfjørð.

- Mítt øki er, at syrgja fyri, at sambandið um Leirvíksfjørð er so gott sum tað nú einaferð kann verða. Eg kann ikki fara at blanda meg upp í eitt mál um ein undirsjóvartunnil, tað er eitt politiskt mál.

Spurdur um, hví Strandferðslan tók síni umboð úr arbeiðsbólkinum, sum í 1998 varð settur til at arbeiða við støðuni, sigur Strandferðslustjórin, at hatta er eitt serligt dømi, sum Jógvan við Keldu tekur fram.

- Eg tók fólkini hjá okkum úr bólkinum, tá tað gjørdist mær greitt, at tey við millum annað at vilja verða við til at leggja ferðaætlanina um Leirvíksfjørð, komu ov langt inn á okkara arbeiðsøki. Tað er ikki ábyrgdin hjá nøkrum arbeiðsbólki, og tað vildi eg ikki finna meg í, sigur Reidar Nónfjall.

Hann sigur eisini, at Jógvan við Keldu átti heldur sum politikari at gjørt okkurt fyri at loysa trupulleikan enn at leggja eftir Strandferðsluni í fjølmiðlunum og samstundis setur hann spurnartekin við, hví Jógvan við Keldu stemmaði í móti einum avloysaraskipi fyri nøkrum fáum mánaðum síðani.

tt te e o u

A to e u
te e o u

Te e u e o tt t

t t e u
te e o u

Te e u e o tt t

Deildirnar í Runavík, Klaksvík og Tvøroyri hava framvegis sama telefon- og telefaxnummar.

A to
J. Broncksgøta 27
Postrúm 3096
Tlf. 35 35 10 Fax. Nr. 35 35 11

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Leggja stilt í summar í Runavík

Fleiri skip hava landað til Fiskavirking í Saltangará hesa vikuna. Miðskeiðis í vikuni landaði Vesturskin 130.000 pund
Mynd: Vilmund Jacobsen

Fleiri skip hava landað til Fiskavirking í Saltangará hesa vikuna

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Fýra trolarar hava landað til Fiskavirking í Saltangará hesa vikuna.

Miðskeiðis í vikuni var Vesturskin við 1400 kassum – ella umleið 130.000 pundum, harav 90.000 pund var upsi, sum virkið í Saltangará keypti. Vesturskin hevði eisini nakað av kongafiski, toski og øðrum fiskasløgum, sum onnur virki keyptu.

Hósdagin var Safir inni. Skipið var fult undir lúkurnar. Veiðan vá umleið 130.000 pund. Eini 120.000 pund var upsi.

Tá ið vit frættu fríggjamorgunin, vóru Jaspis og Ametyst inni. Teir høvdu góð 240.000 pund og vóru fullir undir lúkurnar. Meginparturin upsi.

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at Fiskavirking í Saltangará keypti veiðina hjá Jaspis. Fiskurin hjá Ametyst fór til onnur virki.

Ábøtur og broytingar

Á Fiskavirking í Saltangará verður fiskaarbeiði lagt stilt í viku 31, 32 og 33; tá fer fólkið í summarfrí, og samstundis verða nakrar ábøtur og broytingar framdar á virkinum.

Hetta er eitt gamalt virki, sum er útbygt so við og við, sum árini eru liðin.

Seinasta útbyggingin, er ein høll, sum er bygd suður úr virkinum.

Jason Johannesen sigur, at hetta í fyrsta lagi er ein móttøkuhøll til fiskin sum samstundis er kuldarúm. Uppíbyggingin er einar 690 fermetrar.

– Tá ið høllin er liðug, er ætlanin, at hon eisini skal vera karmur um skiljing av fiski, sigur hann.

Virkisleiðarin sigur, at nú fólkið fer í summarfrí, verða ymiskar broytingar og ábøtur eisini framdar.

– Nøkur bond verða flutt og aðrar broytingar gjørdar, soleiðis at arbeiðsumstøðurnar verða betur. Pláss verður eisini gjørt fyri tveimum nýggjum skerilinjum, men hesar verða ikki settar upp beinanvegin, sigur Jason.

Eingin køling

Hann vísir á, at umstøðurnar til móttøku av fiski eru nógv betri, nú tey hava fingið nýggju høllina, sum kølir fiskin.

– Fyrr høvdu vit bara ein kjallara at seta fiskin í, og tað haldi eg vera óforsvarligt í longdini.

Sum skilst á Jason Johannesen, hava nøkur virki køling í móttøkuhøllini, meðan onnur ikki hava.

– Tað kann kanska undra, at landingarmiðstøðirnar ikki hava køling í móttøkuhøllunum, sum átti at verið ein sjálvfylgja, sigur virkisleiðarin.